FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

# Verkfrøðingur

Til teknisku deild hjá Fuglafjarðar kommunu er eitt starv sum verkfrøðingingur leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávur:**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja, eru:
- Útstykkingar
- Nýgerð og umvæling av vegum og kloakkum
- Havnabygging
- Útbygging og viðlíkahald av vatnverki
- Nýgerð og umvæling av kommunalum bygningum
- Byggimálsviðgerð

**Førleikakrøv:**
Søkt verður eftir verkfrøðingi ella umsøkjara ið hevur samsvarandi útbúgving ella royndir og sum sjálvstøðugt kann arbeiða við projektering og eftirliti v.m. innan nevndu virkisøki.

Tekniarbeiði verður gjørt á MicroStation forriti.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknir saman við prógvum og upplýsingum um lívsroyndir skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 11. november 2007 kl. 16.00 á adressuni

Fuglafjarðar kommuna
tekniska deild
postboks 30
530 Fuglafjørður

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær Pætur Joensen, býarverkfrøðing, tlf. 737705, e-postur: patur@fuglafjordur.fo

*Fuglafjørður, 25-10-2007*

LEIRVÍKAR KOMMUNA

# Námsfrøðingur til Frítíðaransingina í Leirvík

Frítíðaransingin Ternan í Leirvík søkir eftir námsfrøðingi at byrja 19. november 2007 ella skjótast tilber.

Stovnurin umfatar í løtuni børn sum ganga í 1. og 2. flokki

Frá hálvum november er ætlanin at víðka frítíðaransingina til eisini at umfata árgangin undir skúlaaldur ( 6 – 7 ára gomul ).

**Vit ynskja at tú:**
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn og starvsfelagar
- At tú heldur arbeiðið við 6 – 9 ára gomlum børnum verða spennandi
- At tær dámar og hevur hug at verða úti í nátturuni saman við børnunum
- At tú dugir at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar
- At tú vilt verða við til at menna okkara stovn

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF / Fíggjamáláráðið.

Umsóknarfreist er mánadagin 12. november 2007.

Tú fært nærri upplýsingar um starvið, við at venda tær til leiðaran á tlf. 743125 / 443125.

Skrivlig umsókn við prógvi / viðmælum v.m. skal sendast til Leirvíkar Kommunu.

Um ongin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett ístaðin.

**Leirvíkar Kommuna**
*Kulibakki 15 · FO – 520 Leirvík*
*Tlf. 443006 · Heimasíða: www.leirvik.fo*
*Teldupostur: leirvik@leirvik.fo*

# Kunngerð

Valevnislistarnir til fólkatingsvalið týsdagin 13. november 2007 skulu vera formanninum fyri fólkatingsvalnevndini í hendi seinast fríggjadagin 2. november 2007 kl 18.00.

Sagt verður frá, at sambart vallógini skal valevnislistin verða undirskrivaður av valevninum við upplýsing um fult navn, føðingardag, starv og fullan bústað. Á valevnislistanum skal eisini verða upplýst navn og bústaður á einum veljara (tlf. nr.), sum fólkatingsvalnenvdin, umframt valevni, kann venda sær til, um villa er í valevnislistanum o.a.

Valevni, ið stilla upp fyri flokk (sum er umboðaður á Føroya Løgtingi), skal upplýsa hetta á valevnislistanum. Í seinasta lagi mánadagin 5. november 2007 kl 18.00, skulu flokkarnir boða fólkatingsvalnevndini frá, hvørji valevni flokkurin góðkennir. Fráboðanin skal fyri hvørt góðkent valevni innihalda upplýsing um navn, føðingardag og fullan bústað á hesum. Valevni, sum ikki verða góðkend av viðkomandi flokki, kunnu ikki stilla upp til valið. Um góðkenning ikki fyriliggur, kann einki valevni stilla upp fyri flokkin.

Valevni, ið stilla upp uttanflokka, skulu upplýsa hetta á valevnislistanum (tlf. nr.). Valevnislistin skal einsi verða undirskrivaður av stillarum (av minst 150 og hægst 200 veljaru í Føroyum) við upplýsing um navn, føðingardag, starv og fullan bústa teirra.

*Tórshavn 25 oktober 2007*

FÓLKATINGSVALNEVNDIN FYRI FØROYAR
Olaf á Stongunum, fm.
Í Brekkuni 9
FO-110 Tórshavn
Tlf. nr. 31 46 91 ella 21 46 91

# Bilførari søkist

Trailarakoyrikort og royndir innan trailaraflutning krevst.

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Sp/f OCD**
FO-600 Saltangará
Tel. 477200

# Reingerðarfólk

Søkt verður eftir reingerðarfólki til Skúlan á Trøðni at byrja 1. desember 2007.

Arbeiðstíðin er frá kl. 14.00 og er 27 tímar um vikuna.

Løn samb. sáttmála við Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Umsókn verður at senda til:
Skúlin á Trøðni
Postrúm 2036
165 Argir

Viðmerk: »Reingerðarfólk«.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Jan Christiansen, skúlastjóra, tlf. 280025.

Umsóknarfreist: 12. november 2007.

**Skúlin á Trøðni**
Frælsið 32 – Postrúm 2036 – 165 Argir
Telefon 314522 – Fax 310196

**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 37 11 33 · Fax: 37 11 42
E-mail: ssh@ssh.fo

# Frá Suðuroyar Sjúkrahúsi og Suðuroyar Ellis- & Røktarheimi

**Vit hava fingið nýggj telefonnummur**

Suðuroyar Sjúkrahús
**34 33 00**

Suðuroyar Ellis-& Røktarheim
**34 33 10**

Sosialurin
www.sosialurin.fo